


*Okkara besti svimjari, Pál Joensen, fær her góð ráð frá estiska professaranum, Rein Haljand, sum kannar og greinar føroysku landsliðssvimjararnar*

*Mynd: Svimjisambandið*

# Svimjarar smá framstig

**SVIMJING** **Royndir og greiningar hjá estiska professaranum, Rein Haljand, geva fleiri av føroyskum toppsvimjarunum nakað at hugsa um, tí teir ikki gera nóg stór framstig í betringini av svimjiteknikkinum**

Hilmar Jan Hansen

Rein Haljand, sum hevur kannað føroysku landsliðssvimjararnar síðstu trý árini, var aftur í Føroyum herfyri, og niðurstøða hansara var tá, at svimjararnir ikki høvdu flutt seg so langt, sum væntað, men at teir eru lýdnir og ágrýtnir, so framvegis er nógv at arbeiða við, ið kann gera mun.

Arbeiðsmátin hjá estiska professaranum er, at hann filmar og greinar svimjiteknikkin, og hann hevur drúgvar royndir, ið ganga heilt aftur til 1972. Serliga hevur hann áhuga fyri Páli Joensen, og sum esti vil hann fegin hjálpa Norðurlondum fram á leið í altjóða svimjing.

Nú hann aftur kannaði føroysku svimjararnar, kundi hann staðfesta, at í onkrum førum vóru feilir framvegis ikki rættaðir, sum tey fingu at vita um bæði í fjør og fyrraárið, men í onkrum øðrum førum høvdu svimjararnir tikið við ráðunum. Sum heild vísti tað seg tó, at føroysku svimjararnir ikki fylgdu ráðunum í sama mun sum svimjarar aðrastaðni.

Kortini tekur tað einki frá føroysku svimjarunum annars, tí tað er undrunarvert, at fleiri hava fingið so góð úrslit, sum tey hava – enntá uttan at hava fylgt vegleiðingini frá Rein Haljand, sum annars letur væl at svimjarunum, sum hann heldur hava góð evni.

hilmarjan@sosialurin.fo

## MTB-KAPPINGIN
### LEYGARDAGIN

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Høgni Rúnason Øster | 2.00:23 |
| 2 | Kári Simonsen | 2.00:34 |
| 3 | Matti Brøndsted | 2.03:55 |
| 4 | Eli Christiansen | 2.21:20 |
| 5 | Heini Harryson | 2.25:35 |
| 6 | Mikkel Hougaard | DNF |

# Høgni vann í Hoydølum

**FJALLASÚKKLING** **Í harðari kapping við Kára Simonsen eydnaðist Høgna Rúnason Øster at vinna MTB-kappingina, sum var í Hoydølum leygardagin**




*Teinurin í kappingini leygardagin var á gøtunum yvir móti Boðanesi og inni í viðarlundini, og hann fevndi um mótbrekkur, undanbrekkur, eina rúgvu av svingum – og trappur, sum her sæst aftan fyri Eli J. Christiansen*

*Mynd: Tórshavnar Súkklufelag*

Hilmar Jan Hansen

Longu undan kappingini leygardagin var greitt, at fleiri av teimum bestu súkklarunum ikki fóru at vera við, tí teir vóru á venjingarlegu uttanlands, har teir fyrireika seg til Oyggjaleikirnar á Isle of Wight í summar. Tískil vóru ikki so nógvir súkklarar við hesa ferð, sum tað plagar at vera.

Hinvegin kundi roknast við, at teir seks, ið stillaðu upp til startin í Hoydølum, kundu gerast rættiliga javnir, og so var eisini. Tó var eitt glopp millum tríggjar teir fremstu og restina, men ymiskt var, sum gav kappingini spenning ávegis – og ikki minst, tá teir báðir fremstu komu á mál.

Ásetti teinurin var umleið 34 kilometrar, sum merkir átta umfør í sera vakra umráðnum í Hoydølum, ið millum annað fevnir um skógarvøksturin í viðarlundini. Teinurin var á gøtunum yvir móti Boðanesi og inni í viðarlundini, og bæði startur og mál vóru við fimleikahøllina hjá studentaskúlanum.

Hóast 34 kilometrar ikki ljóðar av so nógvum, so er talan avgjørt ikki um ein slættan tein, men hinvegin mótbrekkur, undanbrekkur, trappur og eina rúgvu av svingum.

### Hørð kapping

Tað sást skjótt, at kappingin um at vinna, fór at standa millum Høgna Rúnason Øster og Kára Simonsen, tí teir fylgdust tað mesta av teininum í teir tveir tímarnar, tað tók teimum báðum at gjøgnumføra tey átta umførini. Teir skiftust um at vera tann fremri, men ongantíð var meira enn hálvur minuttur ímillum teir.

Ikki kundu teir heldur taka sær av løttum, tí maðurin á triðja plássi, Matti Brøndsted, var ongantíð so mikið langt aftan fyri teir, at teir kundu kenna seg heilt tryggar. Sum so ofta er við súkkling, kann jú ein punktering ella avlopin keta vera nóg mikið til at broyta alt.

Tá Høgni og Kári nærkaðust málinum, vísti tað seg, at Høgni hevði meira at geva í endaspurtinum og var 11 sekund framman fyri Kára, sum so aftur var hálvanfjórða minutt framman fyri Matti. Kappingin um fjórða plássið stóð millum Eli J. Christiansen og Heina Harryson, sum vóru eitt fitt petti aftan fyri tríggjar teir fremstu, men har hevði Eli munin og var góðar fýra minuttir framman fyri Harry.



*Mynd: Álvur Haraldsen*

# B36 hevði 500 gestir

**FÓTBÓLTUR** **Mong nýttu høvið til at heilsa uppá, tá B36 seinnapartin mánadagin hevði móttøku, nú felagið fylti 75 ár**

Hilmar Jan Hansen

Móttøkan var í B36-húsinum, har dekkað var upp við pinnamati, køkum, hvítvíni, kaffi og øðrum, og sambært B36-heimasíðuna hevði felagið ikki færri enn einar 500 føðingardagsgestir seinnapartin mánadagin.

Fleiri tóku orðið og røðararnir vóru Sámal Ímundarsson, formaður í B36, Heðin Mortensen, borgarstjóri, Christian Andreasen, FSF-forseti, Petur Elias Petersen, ÍSF-forseti, Dánjal Pauli Danielsen, HB-formaður, og Hans Birgir Hansen, B36-ari.



*Sámal Ímundarsson, formaður í B36*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sum skilst, er ætlanin hjá B36 at hava eina stóra 75 ára veitslu í heyst, og óivað verður runda árið markerað á ymsan hátt teir komandi mánaðirnar.

hilmarjan@sosialurin.fo